# Týskt

Er tað nakað fyri teg?
Svarið finnur tú í faldaranum

Týskt er ein vallærugrein,
tí er tað tín avgerð, um tú vilt læra týskt.
Viðkomandi upplýsingar og tíð at
umhugsa seg eru umráðandi,
tá tað snýr seg um teg og tína framtíð

Sigmund Freud
Heidi og Fjallaabbin
Albert Einstein
Karl Marx
Anne Frank
Bayern München
Brøðurnir Grimm
Goethe
Arnold Schwarzenegger
Beethoven
BASF
Mozart
Nietzsche
Deutsche Bundesliga
Conchita Wurst
Martin Luther




**Mál geva grundleggjandi førleikar at skilja heimin og at liva og virka í honum**

NÁM

# Hví læra týskt?




At duga týskt gevur tær nógvar fyrimunir á fleiri økjum. Visti tú t.d. at:

- yvir 90 milliónir fólk hava týskt sum móðurmál í Evropa
- yvir 100 milliónir fólk hava týskt sum móðurmál í allari verðini
- týskt er almenna málið í Týsklandi, Eysturríki og Liktinstein, høvuðsmálið í Sveis, eitt av almennu málunum í Belgia og Luksemborg og eitt minnilutamál í nógvum londum kring allan heimin
- týskt er mest útbreidda móðurmál í Evropa eftir russiskt. Á triðja plássi kemur franskt og á fjórða plássi enskt
- í ES (Evropasamveldinum) hevur fimti hvør borgari týskt sum móðurmál
- týskt er eitt heimsmál, sum nógv eisini læra sum fremmandamál
- Týskland er búskaparliga sterkasta landið í Evropa og fjórðasterkasta í heiminum
- ein stórur partur av øllum ferðafólkum í Føroyum tosa týskt
- týsk ferðafólk leggja mest pening eftir seg í øllum heiminum
- í vísindum er týskt næstmest brúkta málið í øllum heiminum
- í gransking er Týskland á triðja plássi í øllum heiminum
- í handilsskapi og mentan er týskt eitt týðandi mál í øllum heiminum
- Týskland er á 5. plássi millum øll heimsins lond at geva bøkur út
- ein tíggjundapartur av øllum bókum og sBókum í heiminum eru á týskum
- týskt er næstmest brúkta málið á øllum heimasíðum í heiminum



# Hvussu er at læra týskt?

Føroyskt og týskt hava felags uppruna og líkjast í roynd og veru nógv:

- ofta kunnu vit gita týdningin á orðum, tí tey líkjast føroyskum ella donskum
- vit siga hann, hon ella tað um øll navnorð á báðum málunum
- týskt og føroyskt eru bæði fallmál, sum ger, at bygnaðurin líkist nógv

Týsk mállæra hevur so at siga eingi undantøk. Tað ger málið lætt at læra eftir bókini. Og so er týska stavsetingin eisini beint fram eftir úttaluni.

# Hvat siga næmingar um týska mállæru?

- Tað góða við týskum er, at mállæran hevur svarið til so at siga allar málsligar spurningar
- Stavsetingin og úttalan liggja tætt upp at hvørjum øðrum og eru tí ikki torfør
- Næmingar siga eisini, at tey læra nógv føroyskt í tímunum, tí nógv kemur upp á pláss, sum tey ikki reiðiliga høvdu skilt ella lært um frammanundan
- Tey flestu eru eisini glað fyri at fáa eina greiðari fatan av máli í heila tikið, sum tey eisini kunnu brúka víðari

# Hvør eigur at velja týskt?

- allir næmingar, sum eru miðal ella væl fyri fakliga
- allir næmingar, sum dáma ella sakna fakligar avbjóðingar
- allir næmingar, sum dáma mál, mentan og kunnleika til onnur lond
- allir næmingar, sum tíma at arbeiða við mállæru
- allir næmingar, sum umhugsa at velja fremmandamál á miðnámi

# Týskt í fólkaskúlanum

Umhugsar tú at læra enn fleiri mál, kanst tú velja týskt í 7./8. - 9./10.flokki. At byrja eitt nýtt fremmandamál nú, hevur fleiri fyrimunir:

- jú fyrr tú byrjar, jú lættari fellir tær at læra fremmand mál
- jú færri ár ganga ímillum hvørt fremmandamálið, jú betur fært tú brúkt tínar royndir
- lærir tú málið í minst trý ár, økist førleikin munandi fyri at halda málið við líka og at brúka tað seinni í lívinum

# Týskt á miðnámi




Í føroyska fólkaskúlanum er týskt einasta valfría fremmandamálið, sum:

- gevur tær møguleika fyri beinleiðis framhaldi á miðnámi
- gevur tær møguleika at enda eftir einum ári á miðnámi
- gevur tær møguleika at enda á hægri stigi enn bæði franskt og spanskt á miðnámi
- er lættari at læra á høgum stigi enn hini heimsmálini, tí mállæran hevur fá undantøk

Tú kanst eisini velja týskt sum byrjanarmál á miðnámi, men tá avmarkar tú tínar møguleikar til hægst trý ár og eitt lægri endaligt stig.

Les meir á: snar.fo/folkaskuli/tyskt